# Hanus Kamban fær rós

**Danska dagblaðið, Information, ummælir stuttsøgusavnið hjá Hanusi Kamban, Pílagrímar, ið herfyri varð umsett til danskt**

DANSKT UMMÆLIÐ
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Á internetútgávuni hjá danska dagblaðnum, Information, mikudagin verður stuttsøgusavnið hjá Hanusi Kamban, Pílagrímar, ummælt. Stuttsøgusavnið hjá Hanusi varð í fjør skotið upp til bókmentavirðislønina hjá Norðurlandaráðnum, og nú er stuttsøgusavnið umsett til danskt.

Ummælarin á Information, Erik Skyum-Nielsen, heldur nógv av savninum hjá Hanusi Kamban.

– Det er ikke særlig tit, jeg er enig med Weekendavisens Ulrik Høy, men jeg blev glad, da han for nylig anbefalede Pilgrimme som sin sommerferielæsning, sigur Erik Skyum-Nielsen.

Danski ummælarin leggur føroyskan rithøvundin undir at vera bersøgnan, tó við grein í sínum máli.

– Jovist, Hanus Kamban kan indimellem være barsk i mælet og ren i spyttet. Men hvad der først og fremmest gør indtryk i disse ni noveller, er kombinationen af på den ene side en overomhyggelig, undertiden næsten overopbyggelig skrift og så en viden om, hvor galt det kan gå, både mellem mennesker og, når de er helt alene, dybt inde i dem, er millum skoðsmálini føroyski rithøvundurin í Information.



*Føroyskur rithøvundurin, Hanus Kamban, fær rós av ummælaranum á Information, Erik Skyum-Nielsen*

# Nýggj avtala kann slóða vegin fyri lítla Peturi

**Ein nýggj avtala millum føroyskar og danskar myndugleikar kveistrar allar løgfrøðiligar forðingar burtur fyri, at Karup kommuna kann lata lítla Petur verða búgvandi í Føroyum. Kortini er nakað á mál, og seinasta orðið í málinum um lítla Petur hevur Karup kommuna og pápi Petur**

NÝGGJ AVTALA
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



Føroyska Almanna- og heilsumálaráðið og danska Socialministeriet hava undirskrivað avtalu, sum heimilar donskum kommunum at senda børn og ung til Føroya á viðgerðarstovn. Higartil hava bert føroyskar kommunur kunnu gjørt sær dælt av at senda børn og ung á viðgerðarstovn í donskum kommunum, men við nýggju avtalu ber eisini til at fáa streymin at ganga hinvegin.

Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum, Hans Pauli Strøm, sigur, at avtalan hevur leingi verið undir uppsigling, men endiliga er avtalan komin undir land.

### Petur í miðdeplinum

Í nógv umstrídda málinum um fimm ára gamla Petur, ið hevur atferðartrupulleikar, kann avtalan millum Almanna- og heilsumálaráðið og Sosialministeriet fáa avgerandi týdning.

Pápi Petur hevur foreldramynduleikan yvir Peturi, og fimm ára gamli drongurin er tí í løtuni fevndur av danska lógarverkinum. Uttan nýggju avtaluna hevði Karup kommuna við røttum kunnu tvíhildið um, at hon ikki hevði heimild at senda lítla Petur á føroyskan viðgerðarstovn, tí eingin lógarheimild var.

– Nýggja avtalan letur upp møguleikan fyri, at Karup kommuna kann senda lítla Petur á føroyskan viðgerðarstovn. Parturin hjá Almanna- og heilsumálaráðnum í málinum um lítla Petur er at skapa fyritreytir, og tað haldi eg, at tú av røttum kanst siga, vit hava gjørt við hesari avtalu, vísir Hans Pauli Strøm á.

### Stovnstilboð

Í løtuni arbeiða embætisfólk og fakfólk av lívsins kreftum við at útvega atferðartruplum børnum eitt stovnstilboð í Føroyum. Allir aldursbólkar uttan smærri børn hava møguleikan at fara á stovn í Føroyum, men landsstýrismaðurin sigur, at tað verður lagt nógv fyri at veita atferðartruplum børnum sama møguleika í Føroyum.

– Arbeiðið við stápla eitt stovnstilboð til børn á beinini gongur væl. Slíkt arbeiði tekur vanliga langa tíð, men arbeiðsbólkurin arbeiðir skjótt. Í løtuni verður kannað, hvørji hús kunnu koma upp á tal, sigur Hans Pauli Strøm.

Landsstýrismaðurin hevði upprunaliga sett nøsina eftir at útbyggja núverandi fosturforeldraskipan, men hendan ætlanin er eftir øllum at døma slept, og miðað verður nú ímóti at veita atferðartruplum smá-

*– Nýggja avtalan letur upp møguleikan fyri, at Karup kommuna kann senda lítla Petur á føroyskan viðgerðarstovn. Parturin hjá Almanna- og heilsumálaráðnum í málinum um lítla Petur er at skapa fyritreytir, og tað haldi eg, at tú av røttum kanst siga, vit hava gjørt við hesari avtalu, vísir Hans Pauli Strøm á*

børnum eitt varðandi stovnstilboð

### Samskifta

Eyðun Jensen á Sosialu deild í Tórhavnar býráð sigur, at framvegis er einki endaligt komið upp á pláss í málinum um lítla Petur. Tórshavnar kommuna og Karup kommuna samskifta dúgliga, men Eyðun Jensen dugir ikki at siga, hvør endaligi úrskurðurin verður í nógv umtalaða málinum.

– Nýggja avtalan gevur Karup kommunu løgfrøðiliga heimild at lata Petur á føroyskan viðgerðarstovn. Tá alt kemur til alt verður tað avgerðin hjá Karup kommunu í samráð við foreldramynduleikan, ið avger lagnuna hjá lítla Peturi, sigur Eyðun Jensen á Sosialu deild á Tórshavnar kommunu.

# Tey menningartarnaðu vilja eisini vera við

**Vikuskiftið 21.- og 22. august verður fyri fyrstu ferð skipað fyri Teitis Festivalinum, ið er ein familjufestivalur fyri menningartarnað**

NÝGGJUR FESTIVALUR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Jazz. G!. Summar.

Seinnu árini hava tónleikafestivalar í Føroyum veruliga fingið bein at ganga á. Nú vilja tey menningartarnu eisini sleppa upp í part. Vikuskiftið 21. -22. august skipar tónleikartiltakið Teitis saman við Fimleikafelagnum Ljósinum fyri familjufestivali, har tey menningartarnaðu og teirra mentan eru í miðdeplinum. Teitis Festivalurin verður heitið á nýggja familjufestivalinum hjá teimum menningartarnaðu.

### Tónleikur í hásæti

Á Teitis Festivalinum fara tey menningartarnaðu millum annað at sýna sínar tónleikagávur. Millum bólkarnar, ið fara at framføra, eru M´s Blues Band og Ælabogin. Úr Íslandi og Danmark koma ávíkavíst Blikandi Stjørnur og ØPP( øl, pølser og popcorn) at spæla.

Tey menningartarnaðu fara eisini at skipa fyri listaframsýning á festivalinum, har møguleiki verður fyri síggja málningar, ið tey menningartarnaðu hava gjørt.

Á festivalinum verða eisini Angela og Hannibal, búktalari, karaokepallur og Absalon Áárgarð. Kommunuskúlagarðurin verður karmur um Teitis Festivalin.



*M´s Blues Band verður millum bólkarnar á nýggja Teitis Festivalinum í august mánað*

*avnsmynd*



# 87 ára gamal maskinførari

**Arbeiðið uppi í Borðoyavík við norðoyatunlinum gongur væl. Eitt er sjálvt boriarbeiði, men tað stendst nógv annað arbeiði av øllum grótinum, sum kemur úr tunlinum. Sumt av tí skal skiljast og knúsast. Tí uppgávuni stendur 87 ára gamli Jógvan Gerðalíð fyri**

ARBEIÐSPRÁT
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*




*87 ára gamli Jógvan Gerðalíð stórtrívist í sínum nýggja starvi*

**Klaksvík:**
Við bátahylin í Borðoyavík er eitt stórt arbeiðsøki gjørt í sambandi við norðoyatunnilin. Á hesum økinum verður alt grótið skilt sundur og knúst, sum ikki skal nýtast stórt.

Við knúsaran stendur ein gravkúgv og koyrir í maskinuna. Førari á gravkúnni er 87 ára gamli Jógvan Gerðalíð. Hann hevur drúgvar royndir innan slíkt arbeiði, og dámar honum væl at vera sloppin til arbeiðis.

– Hetta er tann næsta vikan, eg eri her, og mær dámar frágera væl. Tað er deiligt at hava okkurt at gera, sigur hann við einum stórum smíli.

Gangurin er øgiligur, meðan Jógvan koyrir í skiljaran. Har kemur bæði skervur og samfingið burturúr.

– Skervur og samfingið er tað, sum verður nýtt mest, greiðir hann frá.

Tað var J og K Petersen, sum heitti á Jógvan um at koma til arbeiðis. Hetta er ikki fyrstu ferð, at Jógvan arbeiðir fyri hesa fyritøkuna. Eitt skifti arbeiddi hann fyri tey í Hvannasundi.

### Egin maskina

Jógvan eigur sjálvur gravkúnna, og hann og ein annar skiftast um at koyra hana.

Teir knúsa so at siga døgnið runt, so her er talan um rættiliga langar arbeiðsdagar viðhvørt.

– Tað er tó tilvildarligt, sum vit skifta, sigur hann.

Spurdur um hann veruliga orkar at arbeiða so nógv, svarar Jógvan, at tað skal ikki tann stóra likamliga orkan til fyri at gera hetta arbeiðið.

– So longi fingrarnir duga, so er í lagi. Tá høvdið ikki dugir longur, vænti eg, at hini nokk skulu siga frá, sigur fryntiligi maðurin yvir av mær.

Maskinur hevur Jógvan tó átt í langa tíð. Ta fyrstu ognaði hann sær í 1959 ella 1960.

– Hesa, sum vit koyra nú, havi eg tó bert átt í eini fýra ár, greiðir hann frá.

Ikki kann annað sigast, enn at Jógvan er ein tøkningur burturav. Líka frá barnsbeini av hevur hann skrúvað møtrikkar og boltar. Hann minnist aftur á, at tann fyrsti báturin, sum tey áttu við motori, plagdi hann at skrúva uppá.

– Tá hevði man ongan at venda sær til, um okkurt bleiv í ólagi, so man royndi sjálvur.

Men tað er ikki bara stórar maskinur, sum Jógvan dugir væl við. Ta nýmótans tøknina meistrar hann eisini sum onki.

Fyri nøkrum árum síðani keypti hann sær eina teldu, og tað er ongin trupulleiki hjá honum at nýta hana. Hann setti seg sjálvur við henni og lærdi seg at brúka hana. Og tað er ikki nakað óvanligt at fáa teldupost frá Jógvani Gerðalíð. Um tað stendur fast hjá honum, so spyr hann okkurt av abbabørnunum.

– Teldan verður tó nýtt fyri tað mesta at skriva við, sigur hann.

### Lívsstarv

Jógvan greiðir frá, at hansara arbeiði so at siga líka frá barnsbeini av hevur umfatað mold, eyr, skerv og nakað av betongi.

– Eg havi mest fingist við jørðarbeiði, grevstur og spreingiarbeiði, sigur hann. Hann starvaðist í nøkur ár hjá Landsverkfrøðinginum, har hann millum annað stóð fyri arbeiðinum at gera byrgingina frá Norðdepli til Hvannasunds. Hetta arbeiðið umfataði eisini ein part av vegagerðini millum Viðareiði og Hvannasund.

Hann hevur onga útbúgving á pappírinum, men útfrá øllum, sum hann greiðir frá, so kann bara sláast fast, at her er talan um ein mann, sum hevur nomið sær sína útbúgving og arbeiðsroyndir av sínum eintingum.

– Ja, man kann nokk siga, at eg eri sjálvlærdur, sigur Jógvan.

Spurdur, um hvat konan sigur til, at hann er farin aftur at arbeiða á gamalsaldrinum, svarar Jógvan flennandi, at tað man hon vera so von við.

### Góðar umstøður

Jógvan letur sera væl at arbeiðsumstøðunum við bátahylin í Borðoyarvík. Men hann heldur, at har er nógv broytt síðani tann 20. apríl, tá fyrsta skotið varð latið av.

Tá var Jógvan sjálvur hjástaddur. Tá hevði hann helst ikki væntað, at arbeiðsboð fóru at verða eftir honum.

– Eg síggi bara, at har er eitt stórt øki burtur við øllum bønum hjá Gerða, Uppsala og Vágsmonnum. Og tað er ein sannroynd, at jarðarbrúkið minkar í takt við, at býurin veksur, sigur hann hugsunasamur.

Jógvan hevði sum ungur festi við bæði neytum og seyði, men í dag røkir, Jákup, bróðir hansara tað.

Sum allir aðrir klaksvíkingar er Jógvan sera spentur til tunnilin er liðugur. Men bersøgin er hann tó og sigur, at nú eru árini vorðin so mong hjá honum, at tað verður neyvan hann, sum kemur at gera størstu nýtsluna av tunlinum.

– Men norðoyatunnilin er ein stór broyting, og mín vón er, at tað fer at merkja framburð fyri økini báðu megin tunnilin, sigur blíði gerðamaðurin at enda.

# Summar Festivalur á Rás 2

Nú fer at bera til at frætta alt um nýggja Summar Festivalin á Rás 2.

Hvønn hósdag fram til festivalurin verður í Klaksvík mitt í august mánaði, fer Rás 2 at senda eina upplýsandi og undirhaldandi sending um Summar Festivalin.

Sendingin verður ein tíma til longdar hvørja ferð, og í sendingini verður greitt frá øllum tí, sum verður á skránni á festivalinum.

Tosað verður um og við bólkarnar og solistarnar, sum skulu spæla, tónleikur hjá festivalbólkunum verður at hoyra, og fyrireikararnir fara eisini at greiða frá ymiskum.

Summar Festivalurin verður í Klaksvík í døgunum frá 12. til 15. august, og konsertir verða bæði inni og úti. Úr útlondum koma nøvn sum Ken Hensley, Boney M, Gunnar Mikkelsen og Kjell Samuelson, og millum tey føroysku nøvnini eru Frændur, Hanus G. Johansen, Guðrun Sólja Jacobsen, Hjarnar og Sigrid Rasmussen.

Sendingin um Summar Festivalin verður á Rás 2 hvønn hósdag klokkan 17.00, og vertur fyri sendingini verður Martin Kjærbo.